# Trý eru um boðið

**FÓTBÓLTUR** So hvørt sum tað líður út á kappingina í 1. deild hjá monnum, sær tað meira út til, at kappingin um tey bæði uppflytingarplássini fer at vera ímillum hesi trý: FC Suðuroy, AB og TB

Hilmar Jan Hansen

Talan var um ein nokk so avgerandi dyst, tá FC Suðuroy vitjaði Skála leygardagin, tí her hevði suðuroyarliðið høvið at lata ein potentiellan kappingarneytan hanga eitt sindur longur afturi. Og tað var eisini júst tað, sum eydnaðist hjá FC Suðuroy, ið vann dystin 2-1.

Skála hevði síðstu dystirnar víst góðar taktir og arbeitt seg upp eftir stigatalvuni. Nú FC Suðuroy vitjaði, fingu liðini eitt mál í part beint fyri hálvleik, og so livdi dysturin annars sítt fríska lív, til toppskjúttin í deildini, ghanesiski David Asare, eitt korter fyri tíð skoraði sigursmálið fyri suðuroyingarnar.

Sostatt er FC Suðuroy framvegis oddalið í 1. deild hjá monnum, nú við 20 stigum og ávikavist tvey og trý stig framman fyri næstu kappingarneytarnar, sum eru AB og TB. Skála er framvegis fremst av avbjóðarunum longur niðri við 10 stigum, sum er tað sama sum FC Hoyvík hevur, men har er málúrtøkan munandi verri.

## AB og TB fylgja við

AB, sum liggur til at flyta upp í løtuni, fekk fitta mótstøðu frá Víkingi í Leirvík leygardagin, tí hóast gestirnir komu á odda í fyrra hálvleiki, var tað ikki fyrr enn eitt gott korter fyri tíð, at teir kundu kenna seg tryggar, áðrenn Víkingur minkaði um munin við einum brotssparki.

Hetta var fjórði sigurin á rað hjá AB, sum heldur ikki hevur dult, at ætlanin hevur verið at sloppið uppaftur í Vodafonedeildina sum skjótast. Dysturin var annars nokk so ófriðarligur og fevndi um heili sjey gul kort, harav argjamenn fingu tey fimm.

Triðja liðið, ið liggur og kappast heilt har frammi, TB, hevði vitjan av næstbestu manningini hjá NSÍ, sum síðstu tíðina hevur argað fremstu liðini við at blanda seg upp í oddan. Men á grasinum í Hvalba hevði TB avgjørt munin og vann seg fyri steðgin framum 3-0, so dysturin í roynd og veru longu var avgjørdur.

Liðini fingu hvør sítt mál aftrat áðrenn steðgin, men tað var ongantíð soleiðis, at sigurin hjá TB var í vanda, og tí eru tvøramenn framvegis væl við og bjóða serliga AB av í kappingini um tey bæði fremstu plássini á stigatalvuni.

## FC Hoyvík vaknar

Ikki hevur byrjanin hjá FC Hoyvík verið tann besta, men leygardagin eydnaðist at vinna fyri triðju ferð, tá næstbesta manningin hjá EB/Streymi vitjaði. FC Hoyvík vann 3-1, eftir at hava verið á odda 2-1 í hálvleikinum.

Sigurin hevði stóran týdning fyri hoyvíkingar, ið hava liðið og rótað í botninum, men nú kundu taka eitt stórt fet frá niðurflytingarstrikuni og teljast millum liðini upp ímóti miðjuni. EB/Streymur, sum eins og NSÍ hevur argað fleiri av hinum liðunum, liggur tó framvegis framman fyri eitt nú FC Hoyvík.

Tað liðið, ið hevur staðið seg ringast av øllum og mestsum longu sær út til at vera á veg niðuraftur í triðbestu deildina, er 07 Vestur, ið heldur ikki hesa ferð fekk nakað burturúr, nú HB vitjaði. Gamaní, kom heimaliðið á odda 1-0, men HB læt seg ikki hótta, men vann ein tryggan 3-1 sigur. Sostatt eiga teir næstbestu hjá 07 Vestur enn fyrsta stigið á.




# KÍ vann toppdystin

**KVINNUFÓTBÓLTUR** Tá KÍ og AB spældu í Klaksvík í gjár, komu ikki færri enn átta mál, men KÍ hevði munin og er nú einsamalt á odda

Hilmar Jan Hansen

Higartil hevði staðið á jøvnum á stigatalvuni, har AB hevði ligið eitt vet ovari, tí liðið hevði betri málúrtøku enn KÍ, men við sama stigatali. Í gjár broyttist hetta tó, tí tá liðini bæði hittust í Klaksvík í toppdysti, dró KÍ longra stráið og vann 5-3. Nú hevur KÍ 19 og AB 16 stig.

Tríggjar ferðir kom KÍ framum, men hvørja ferð megnaði AB at javna. KÍ hevði tó munin í fyrra hálvleiki og var á odda 3-2 í steðginum. Beint eftir hálvleik javnaði AB aftur, men løtu seinni fór KÍ framum 4-3.

Henda støða helt sær, til bara átta minuttir vóru eftir og toppskjúttin í deildini, Rannvá Andreasen, við sínum tíggjunda landskappingarmáli í ár tryggjaði KÍ sigurin.

## Hini fylgjast

Hini fýra liðini í bestu kvinnudeildini síggja út til at fylgjast nokk so væl – eitt fitt petti aftan fyri tey bæði fremstu. Víkingur, Skála og B36 hava øll sjey stig í part, og aftan fyri tey kemur so HB við fýra stigum.

Víkingur var á vitjan hjá HB í Gundadali og kundi at enda eisini fara avstað við øllum. Allur fyrri hálvleikur og eitt korter av seinna hálvleiki skuldi tó ganga, áðrenn nakað mál kom, men so helt Víkingur hinvegin ikki uppat, men vann ein tryggan 4-0 sigur.

Triði dysturin í gjár var millum Skála og B36, har skálakvinnur vístu seg at vera drúgvari og vunnu heimadystin við einum máli í hvørjum hálvleiki, so tær – eins og Víkingur – kundu vinna seg upp á sjey stig.

**1. deild kvinnur**

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 7 | 6 | 1 | 0 | 25 | 5 | +20 | 19 |
| 2 | AB | 7 | 5 | 1 | 1 | 27 | 9 | +18 | 16 |
| 3 | Víkingur | 7 | 2 | 1 | 4 | 18 | 18 | 0 | 7 |
| 4 | Skála | 7 | 2 | 1 | 4 | 7 | 13 | -6 | 7 |
| 5 | B36 | 7 | 2 | 1 | 4 | 6 | 16 | -10 | 7 |
| 6 | HB | 7 | 1 | 1 | 5 | 3 | 25 | -22 | 4 |

*hilmarjan@sosialurin.fo*